

### Almanna- og heilsumálaráðið søkir kt-leiðara

# Dugir tú at stjórna

**Tú megnar at stjórna einum stórum kt-øki. Tú hevur evnini at seta í verk fyriskipanir. Og tær dámar stórar avbjóðingar, har tú veruliga gert mun. Hóska hesar lýsingar til tín, so er tað kanska tær vit leita eftir.**

Eitt nýskipað starv í Almanna- og heilsumálaráðnum er leyst at søkja. Talan er um eitt spennandi leiðarastarv, har tú fært ábyrgdina av øllum kt-økinum í Almanna- og heilsumálaráðnum.

Til ráðið hoyra tey trý sjúkrahúsini í Føroyum, Almannastovan, Heimarøktin og Serforsorgin og Apoteksverkið v.m. og undir hesum stovnum eru aftur aðrir smærri stovnar. Tað er sostatt eitt stórt net av skipanum, ið kt-leiðarin hevur ábyrgdina av.

Nýggi kt-leiðarin fær ein týðandi leiklut í menningini av kt innan almanna- og heilsuøkið. Til dømis er farið undir at gera eina sjúklingaskipan, har upplýsingar um sjúklingar í heilsuverkinum verða talgildar. Samstundis skulu stovnarnir undir ráðnum liva upp til nýggju lógina um viðgerð av persónsupplýsingum, og tað setir stór krøv til trygdina, tí her liggja nógvar viðkvæmar upplýsingar.

Alt hetta krevur, at kt-bygnaðurin verður mentur, og nýggi leiðarin skal standa fyri hesari og øðrum uppgávum.

**Arbeiðs- og ábyrgdarøki**
Kt-leiðarin hevur yvirskipaðu ábyrgdina mótvegis aðalstjóranum og landsstýrismanninum við almanna- og heilsumálum.

Ein aðaluppgáva er at ráðgeva leiðsluna um møguleikar og avbjóðingar við kunningartøkni, hann skal røkja heildarætlanina og luttaka í strategiskum kt-verkætlanum.

Kt-leiðarin skal samskipa keyp av kt-skipanum í ráðnum og skal standa fyri teimum avtalum, sum ráðið ger við veitarar. Harafturat skal hann ráðgeva stovnum undir ráðnum, tá ið teir keypa kt-útgerð og ráðgeva teimum í samskiftinum við veitarar uttanífrá.

Tað áliggur kt-leiðaranum at tryggja, at øll lógarkrøv til kt-økið verða uppfylt. Undir hesum liggur at hava ábyrgdina av kt-trygdini hjá Almanna- og heilsumálaráðnum, at hava yvirskipaða ábyrgdina av kt-trygdini fyri stovnarnar undir ráðnum.

**Krøv og førleikar**
Vit vænta, at umsøkjarar hava akademiskan førleika og hægri útbúgving innan økið. Harafturat er tað ein avgjørdur fyrimunur, um tú hevur royndir ella útbúgving í leiðslu og fyrisiting.

Kt-leiðarin verður í einum støðugum samskifti við leiðarar fyri ymsar stovnar, og tí er neyðugt, at tú dugir væl at samskifta og hevur góð samstarvsevni. Økið stendur fyri stórum broytingum, og tí mást tú hava evnini at seta í verk fyriskipanir.

**Umsókn, setan og løn**
Løn- og setanarviðurskifti verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Verður starvið sett sambært sáttmálanum við BLF, verður tað lønt sum deildarleiðari II, tað er (1. oktober 2004) 37.556,41 krónur um mánaðin og harumframt 15 prosent í eftirløn.

Tú kanst fáa meira at vita við at venda tær til Aibritt á Plógv, aðalstjóra, á telefon 304050 ella á teldupostadressu ahr@ahr.fo.
Umsókn við prógvum, CV og øðrum skjølum skal sendast til:

Almanna- og heilsumálaráðið
Starvsfólkadeildin
Eirargarður 2
FO-100 Tórshavn

Umsóknarfreistin er broytt til tann 11. mars klokkan 12.00.

**Almanna- og heilsumálaráðið**
Eirargarður 2, FO-100 Tórshavn, Tel 30 40 50, Fax 35 40 45, ahr@ahr.fo, www.ahr.fo

www.sansir.fo